Vikuskiftis Sosialurin



## Kvinnur í politikki

Klaksvíkar Býráð skrivaði søgu hesa vikuna, tá fýra kvinnur fyri fyrstu ferð nakrantíð vóru umboðaðar á býráðsfundi í Klaksvíkar Kommunu. Tríggjar kvinnur eru valdar inn í býráði, og hesa vikuna var ein kvinna afturat inni sum eykalimur. Kvinnurnar umboða allar hvør sín flokk, ávíkavist fólkaflokkin, sambandsflokkin, javnaðarflokkin og tjóðveldisflokkin. Gunvá við Keldu umboðar fólkaflokkin. Maria Olsen umboðar Sambandsflokkin og er hon eykaumboð fyri Hans A. Bertholdsen. Eyðgunn Samuelsen umboðar javnaðarflokkin. Jórun Høgnesen umboðar tjóðveldisflokkin.



## Nonna komin til Føroya at grøða

Katólska kirkjan í Føroyum hevur í hesum døgum vitjan av Systur Briege McKenna og Faðir Kevin Scallon. Hesi bæði eru kend fyri teirra grøðingararbeiði. Systir Brieg McKenna hevur skrivað bók um, hvussu hon var grødd frá giktarsjúku, og hvussu hon kendi seg kallaða at grøða onnur. Systur Briege McKenna arbeiðir serliga millum prestar, og seinastu árini hevur hon arbeitt saman við Faðir Kevin Scallon, sum arbeiðir sum andaligur vegleiðari millum katólskar prestar. Leygardagin millum klokkan tíggju og fýra verður retretu dagur í Mariu kirkjuni í Havn við møtum og bønarløtum. Klokkan sjey sama kvøld tala tey í Vesturkirkjuni á ein felagskirkjuligari grøðingarsamkomu. Sunnudagin klokkan ellivu luttaka tey á sunnudagsmessuni í Mariukirkjuni.

# Barsilskipanin má broytast

**Um ein maður missur konuna, beint eftir at hon hevur átt, hevur hann sum pápi ongan møguleika at fara í barsil. Stjórin í ALS, Ernst Jacobsen, sigur seg fleiri ferðir hava heitt á myndugleikarnir at broyta hetta, men enn er onki hent. Eisini mammur, sum gjalda nógv inn í skipanina, kunnu enda í tí støðu, at tær onki fáa burturúr.**

BARSILSSKIPANIN

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*



*Ein kvinna kann gjalda inn í barsilsskipanina eitt heilt arbeiðslív, men er hon uttan inntøku árið beint undan, at hon eigur, fær hon ongar barsilspengar. Og um mamman doyr á barsilssong, hevur pápin ongan møguleika at fáa barsilspengar tær fyrstu 14 vikurnar.*

Eftir at Sosialurin kundi avdúka, at Barsilsskipanin hevði upp í móti tíggju milliónir í avlopið í 2006, og at hetta yvirskotið fer aftur í landskassan, hevur kjak tikið seg upp, um tørvur er á broytingum í skipanini.

Partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru ónøgdir við, at arbeiðsmarknaðurin fíggjar alla skipanina, men ikki hevur tilsvarandi myndugleika. Bjarni Djurholm sigur seg vera forðaðan av Løgtinginum at gjøgnumføra tær broytingar, ið hann heldur vera neyðugar. Og ónøgd er eisini millum brúkarnir av skipanini. Ein mamma í Skopun kundi í Sosialinum greiða frá, at hon bert fekk 1000 krónur um mánaðan, tí hon av serligum orsøkum ikki kundi arbeiða árið, áðrenn hon átti.

Ernst Jacobsen, stjóri á ALS, sigur at barilsskipanin er ein arbeiðsmarknaðskipan, og tí er tað tilknýti til arbeiðsmarknaðin, sum avgerð, hvat foreldur fáa úr skipanini.

Høvuðsreglan er, at mamman fær tað, sum hon hevur fingið í miðal teir seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn hon fer í barsil. Men um hon hevur verið styttri á arbeiðsmarknaðinum, verður miðaltalið rokna út frá tí tíðarskeiðið, sum hon hevur arbeitt. Tó kann útrokningargrundarlagið ikki vera styttri enn tríggjar mánaðir.

Útrokningargrundarlagið hevur ikki verið uppi at venda í politisku skipanini í seinastuni. Tað tykist ikki, sum politikarar halda, at tørvur er á broytingum á hesum øki. Men sum nøkur av upphugsaðu dømunum á hesari síðuni vísa, so eru onkrir ójavnar í skipanini.

Ernst Jacobsen heldur ikki, at tørvur er á at broyta útrokningargrundarlagið. Sambært honum, er síðsta árið tað besta grundarlagið, tí so er seinasta lønarhækkingin íroknað. Tey, sum fella uttanfyri, vera víst til Almannastovuna.

Flestu mammur eru í barsilsskipanini. Í 2006 vóru 663 føðingar, og 625 av hesum vóru í skipanini. Miðalupphæddin, sum mammurnar fingu um mánaðin, var 15.700 krónur. Hetta kundi bent á, at onkur fekk sera lítið.

Ein annar trupuleiki er støðan hjá einkjumonnum. Upphugsaða dømi nummar tvey vísir, at ein maður, sum missir konuna stutt eftir at hon hevur átt er við sviðið soð, og Ernst Jacobsen sigur, at hann fleiri ferðir hevur minnt landsstýrismannin á hesa óhepnu støðu.

- Henda støðan er tíbetur ongantíð hend enn. Men trupulleikin er har, tí pápar hava ongan møguleika at taka barsil áðrenn 14. Viku. At broyta skipanina, so hon loftar hesum trupuleika, er bæði einkult og kostar onki, so Ernst Jacobsen skilur ikki, at hetta ikki verður gjørt.

### Kunnu ikki leggja pengar til síðis

Foreldur kunnu býta tíðina eftir 14. viku í millum sín. Men tað eru ikki nógvir pápar sum nýta henda møguleika. Ernst Jacobsen metir tó, at hetta kann fara at broytast. Í 2006 var miðal útgjaldið til páparnar var 28.100, meðan mammurnar bara fingu 15.700 í miðal. Tá foreldur veruliga fáa eyguni upp fyri, at fleiri pengar liggja í, at pápin fer heim, kann væntast at fleiri brúka henda møguleika, heldur stjórin í ALS. Um so er, fer tað at kosta skipinini dýrt.

- Tað hevði verið ynskiligt, at yvirskot í Barsilsskipanini kundu verið verandi í skipanini. Tíðir broytast, um lønirnar minka, lækkar inntøkan, og um fleiri pápar fara heim, hækka útreiðslurnar. Tí hevði tað verið skilagott, at skipanin eins og ALS skipanin kundi sett pengar av til verri tíðir, sigur Ernst Jacobsen.

Tá lanstýrismaðurin í Innlendismálum, Bjarni Djurholm, hevði eitt uppskot um at broyta barsilskipanina, so hon ikki var beinleiðis partur av fíggjarlógini, segði táverandi løgtingsformaður, Edmund Joensen, at hetta ikki kundi lata seg gera, tí talan var um skatt.

Men stjórin í ALS er ikki samdur í hesum. Í 1995 var ein arbeiðsbólkur settur at meta, um inngjaldið var skattur ella ikki, og niðurstøðan var greið, at talan var ikki um skatt.

Fyrsta Januar 2006 yvirtóku partarnir á arbeiðsmarknaðinum alla fíggingina av barsilskipanini. Grunnurin liggur tó framvegis beinleiðis undir landsstýrinum, og landskassin fær yvirskotið, um nakað er.

Men trupuleikin hjá teimum, sum onki fáa úr skipanini, er ikki beinleiðis knýttur at, um skipanin er almenn ella privat. Í núverandi almennu skipan er barsilsupphæddin knýtt at støðuni á arbeiðsmarknaðinum. Og stjórin í ALS metur, sum sagt, ikki, at tørvur er á broytingum á hesum øki.

## Nøkur upphugsað dømi

**1.** Ein kvinna, sum ikki hevur havt lønandi arbeiði, verður við barn. Hon hevur góða útbúgving, finnur sær eitt arbeiði og arbeiðir í tríggjar mánaðar fyri 24.000 krónur um mánaðin. Síðsta árið áðrenn hon fer í barsil hevur hon soleiðis tilsaman 72.000 krónur í innøku. Hon fer í barsil og fær 24.000 krónur um mánaðin.

Ein onnur kvinna hevur eitt vaskiarbeiði. Hon arbeiðir bara nakrar fáar tímar um dagin og vinnur 6.000 krónur um mánaðin. Hon hevur tí eina ársinntøku á 72.000. Hon fer í barsil og fær 6.000 krónur um mánaðin.

Hóast kvinnurnar hava havt somu ársinntøku, og tí hava goldið tað sama inn í skipanina teir seinastu 12 mánaðirnar, áðrenn tær eiga, so fær onnur fýra ferðir so nógv sum hin í útgjaldi.

**2.** Ein maður missir konu sína, stutt eftir at hon hevur átt. Hon doyr, men lítla barnið livir. Tær fyrstu 14 vikurnar av barsilsskeiðnum eru tilognaðar mammuni, og tær seinustu vikurnar kunnu mamman og pápin býta ímillum sín. Maðurin, sum missir konu sína, fær eina eyka revsing, tí hann hevur ikki rætt til barsilspengar fyrr enn eftir 14. viku. Barnið missir mammuna og fær ikki pápan heim í staðin. Um barnið er ættleitt, hevur pápin harafturímóti rætt til at vera heima frá fyrsta degi av.

**3.** Ein kvinna arbeiðir fulla tíð, frá hon er 18 ár til hon er 30. So verður hon av serligum orsøkum noydd at fara av arbeiðsmarknaðinum í eitt ár. Hetta sama tíðarskeiðið verður hon upp á vegin. Av tí at hon ikki hevur lønandi arbeiðið teir seinastu tólv mánaðirnar áðrenn barsil, fær hon onki útgoldið úr barsilskipanini. Eftir at hava verið heima í eitt ár við 0 krónum um mánaðin, fer hon útaftur at arbeiða. Hon arbeiðir fulla tíð, til hon fer frá sum 67 ára gomul. Hon hevur goldið inn í skipanina í á leið 46 ár, men av tí at hon ikki arbeiddi, beint áðrenn einasta barn hennara kom í verðina, fekk hon einki burtur úr skipanini.

**4.** Ein kona er heimagangandi, tí maðurin er sjómaður. Hann arbeiðir nógv og er nógv burtur. Av tí at hann hevur høga inntøku, betalir hann eisini nógv inn í barsilsskipanina. Tey bæði fáa fýra børn, men hóast tey sum húsarhald hava goldið nógv inn í skipanina fáa tey onki aftur.